# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

†

Kunngjørt verður fyri ætt og vinum, at kæra systir, mostir, fastir, abba- og ommusystir, langabba- og langommusystir okkara

**Jóhanna Maria Gaard**
vanliga nevnd Mia
ættað úr Oyndarfirði

andaðist á Ellis- og røktarheiminum í Runavík týsdagin 5. mai, 86 ára gomul.
Kistan fer av Ellis- og røktarheiminum fríggjadagin kl. 17.00 í Oyndarfjarðar kirkju.
Jarðarferðin verður leygardagin kl. 14.00.

*Fyri tey avvarðandi*
***Jóna, Hansa og Heini***

Tey, ið vilja minnast Miu, kunnu lata Ellis- og røktarheiminum í Runavík eina gávu, konta í peningastovni.

# Janus Kamban farin

Hvassi heglingsælingurin og sólin fyrsta sunnumorgun í mai hóskaðu mestsum ov væl til løtuna tá deyðsboðini av Janusi Kamban komu. Janus, tann altíð blíði, fryntligi og samstundis beinrakni eygleiðarin var slóknaður.

Listamaðurin Janus Kamban menti føroyska høggmyndalist so at siga upp úr ongum við stórum listaligum hegni. Hann var álitið hjá Listafelagnum, og hann var fyrsti fyristøðumaður í Listaskálanum, sum felagið læt byggja.

Høggmyndir hansara hava ein serliga aga og einfalt snið, sum er eyðsýnt í einum av kendastu verkum hansara: Relieffið av monnum, sum draga bát. Hóast tær tykjast einfaldar eru myndir hansara úrslit av álvarsligum stríði og áhaldandi stremban eftir at røkka einum serstøkum listaligum sniði, Drongur og lamb er eitt dømi um tað, eins og



relieffið á húsinum hjá Fiskimannafelagnum. Strangi og ópyntaði stílurin var tilvitaður modernistiskur formur, sum Janus Kamban er fyrsta umboðið fyri í føroyskari høggmyndalist.

Listaligi agin er enn greiðari í grafisku myndum hansara. Hann var tikin úr leikum at lýsa sjógv og fugl í linoleumsskurði. Tilfar, sum at síggja til, eru sera ymisk, men sum kortini runnu saman í hansara kønu hondum.

Høggmyndir og grafisku myndir Janusar av fólki, sjógvi og bátum bera boð um eina støðuga trá eftir at fáa kjarnan í listini og lívinum at standa púra beran og sterkan. Minnisvarðar hansara úti um landið geva landslagnum eina listaliga vídd og vísa á megina í náttúruni.

Janus Kamban var heiðurslimur í Listafelagnum. Vit minnast Janus við stórum takksemi.

**Listafelag Føroya**

# Føðingar

13. apríl fingu Tina Debes Julsgaart og Johan Faulkner Mouritsen, Herlev, ein son. Hann var 53 cm langur og vigaði 3500 gr.

22. apríl fingu Hansina Sigurðsson og Poul Joensen, Klaksvík, ein son. Hann var 57 cm langur og vigaði 5050 gr.

29. apríl fingu Eyð Jansdóttir Høj og Eliesar Fróði Høj, Strondum, eina dóttur. Hon var 49 cm long og vigaði 2565 gr.

1. mai fingu Berit og Jóannes Weihe, Tórshavn, ein son. Hann var 54 cm langur og vigaði 4350 gr.

2. mai fingu Hallgerð og Brian Bjartalíð, Argjum, eina dóttur. Hon var 52 cm long og vigaði 3700 gr.

2. mai fingu Mildrið Jacobsen og Jens Allan Simonsen, Leirvík, eina dóttur. Hon var 55 cm long og vigaði 4050 gr.

4. mai fingu Jonna og Kári Hansen, Saltangará, ein son. Hann var 54 cm langur og vigaði 3375 gr.

5. mai fingu Elin Bech og Andrew Christiansen, Argjum, eina dóttur. Hon var 51 cm long og vigaði 3150 gr.




**Dagurin**
**7. mai. Flavia**, deyð í umleið ár 95. Henda abbadóttir keisaran Vespasianus gjørdist kristin og varð rikin í útlegd. Tróndur Olsen doyði hendan dagin í 1961.

*(Axel Tórgarð: Dagar og nøvn í almanakkanum, 2. broytta útgáva 2008)*

# Heini á Marknagili seksti

Leygardagin eru tað 60 ár síðani Heini á Marknagili í Klaksvík gav fyrsta ljóðið frá sær. Vit eru skyldmenn, pápi hansara Andrias á Marknagili og pápi mín Leivur vóru brøður. Teir eru báðir farnir, og hjá okkum sum eru komin upp í miðjan aldur, gongur tað við rúkandi ferð. Ella tað kennist so. Árini eru tey somu í longd, tað eru okkara evnir at upplíva árini, sum er broyttur.

Nú eri eg ikki klaksvíkingur, og eg kundi hugsað mær, at klaksvíkingar eru samdir. Heini hevur lætt við at samskifta við fólk og hann hevur ein stóran umgangskreds. Og tað eru nøkur ting í lívinum sum forbjóða seg sjálvt. Er tú óbeinasamur, óblíður, súrur og tvørur, so ber illa til at hava ein stóran umgangskreds, uttan so at fólk eru tvungin av hava samband við teg av fíggjarligum ella átrúnaðarligur áðum. Heini eigur hesi vælsignaðu evnini, at fólk kenna seg væl í hansara samveru, tey koma aftur og aftur og sjálvt professionelt, har hann er til arbeiðis, koma fólk at heilsa upp á hann, fyrst og fremst tí hann er Heini, og so sjálvandi eisini tí hann er umboðsmaðurin hjá Skipafelagnum millum fjøllini har norðuri. Eg veit væl, at tað eitur Faroe Ship ella okkurt heilt annað í dag, men tað riggar betri at siga Skipafelagið.

Eitt tað kærasta eg havi lært av heimspekini, av filosofiini eru megnarorðini



hjá eysturpreusaranum Imanuel Kant. "Tú kann ongantíð siga sannleikan sum hann er, tú kann bara siga hann soleiðis sum hann vísir seg fyri tær." Tað vil siga, at mín sannleiki nýtist ikki at vera tín sannleiki.

Og hvussu vísir Heini seg so fyri mær. Hann er mest Lina, mamman, og nokk so nógv Andrias og næstu løtuna er hann bara Andrias, og so dagar ediliga mamman aftur í rundleitta andliti hansara. Einu løtuna er hann mamman í sinnalagi, og næstu løtuna er hann pápin í framburði og soleiðis skiftir. Tað blídliga og tað framfýsna legst í hvørt annað í søtum blandi.

Umframt bingjur, farmabrøv og samband við stór bingjuskip gongur hin leggurin av Stokksoyrarvegi og beint heim í Betesda og til samkomurnar kring landið. Heini livir andaliga lívið við lív og sál og tað er attraktivt hjá honum at koma í samkomuna javnan og regluliga. Eg kenni Heina væl, og eg veit, at hann fer ikki í samkomuna tí hann skal, men tí at arbeiðið í víngarðinum dregur sterkari enn mánin í mysing og Heini kennir seg heilan millum brøður. Her fær hann sín identitet sum eitt Guds barn og kennir fulla vissu um tað sum ikki sæst fyri framman.

Heini hevur hetta samansetta lyndið, sum eisini er umboðað í familjuni í Oyndarfirði, at skifta millum gaman og álvara og onkuntíð at blanda alt saman, soleiðis at tí í sama bili upplivir látur og tung tár. Ein sjarmerandi eginleiki, sum eg ikki dugi enn, og hvør veit.

Heini hevur sett seg niður beint uttanfyri barnaheimið á Bumshamri og tað er eitt fjálgt heim at koma í . Hann er matligur sum fáur og mangan angar av stoktum fiski og leyki út um veggirnar. Tú er vælkomin longu tá ið tú setir bilin niðan fyri húsini og meðan tú gongur niðan gjøgnum tær mongu trappurnar, stendur hann klárur í gongini.

Hjallin hevur hann í túninum og hann er fullur av góðum úr sjónum og av Húsum. Judith er úr ognarhúsi og tað sæst aftur í hjallinum, hóast Heini ikki er nakar úrmælingur innan landbrúk. Tí taka aðrar hendur sær av. Og Heini er ikki smátøkin og oysir ríkiliga av tí sum flytur í hansara hús.

Hiðani verður send ein flógv føðingardagsheilsan til vin mín og skyldmann, sum er eins kønur í Ísraels søgu og okkara egnu. Heini sær stórt í hondunum á teimum sum sleptu og hann hevur kanska lyndi undirmeta seg sjálvan og gloyma, at hann eisini er nakað stórt í eygunum á okkum sum standa honum nær, og ikki minst teimum mongu kring landið sum hann ár eftir ár vælsignar við sínum talugávum, sum peika á tað ónevniliga, sum ongin hevur sæð og sum er upphavið til alt. Og niðri á tí jarðiska heilt niðri á jørðini eru hann eitt undurbarn innan farmaflutning í Norðoyggjum.

Heini verður ikki heima føðingardagin.

Hjartaliga tillukku við degnum.

**Heilsan**
**Jústinus Leivsson**
**Eidesgaard**